BIRITA: NÚ KANN TAÐ IKKI GANGA VERRI

Bæði føroyski liðskiparin og aftasti maður vóru skuffaðar av úrslitinum

Tá kvinnulandsliðið skuldi hava nýggjan liðskipara til dystin móti Belgia, fell valið á 28-ára gomlu Biritu Ellefsen úr Havn, og samstundis flutti hon eisini á plássið, sum liðskiparin undan henni, Kára á Dunga, hevði spælt.

Í fjør spældi Birita allar dystirnar á vinstra vongverja, men hesaferð var vinstrabeinti spælarin flutur á eitt stopparapláss við bundnari uppgávu.

– Mær dámar betri at spæla úti í síðuni, og akkurát hendan dystin var tað ikki stuttligt at spæla í miðverjuni, segði Birita Ellefsen við Sosialin eftir dystin.

Eru tit ikki komnar í fullgóða venjing enn?

– Tað kundi næstan sæð soleiðis út, tí vit klóraðu ikki at renna bóltarnar upp. Vit royndu at fáa spælið at ganga, men tað gekk als ikki. Vit vóru ikki urdir so stórum trýsti, sum vit hava verið onkrar aðrar dystir, men vit fingu ikki uppspælið at ganga hóast tað. Hetta var ikki ein góður dystur fyri okkara viðkomandi, og í mun til dystirar í fjør, var hetta eitt afturstig.

Verður tað ikki trupult at fyrireika seg til næsta dystin við hesum stórtapinum í huga?

– Vit verða noyddar at gloyma alt um hetta tapið, og bert hugsa framefturtil næsta dystin.

Hvat væntar tú tá?

– Tað kann so ikki ganga verri enn hesaferð.

KRISTINA EISINI VÓNBROTIN

– Eg hevði als ikki væntað, at tað fór at ganga so illa hjá okkum. Eg roknaði við, at vit fóru at fáa eitt mál, og at Belgia kanska fór at vinna við einum máli, segði aftasti maður á føroyska liðnum, Kristina Lervig.

Føroyska liðið spældi móti Belgia á útivølli í fjør, og tá taptu tær 2-0.

– Í mun til tann dystin, vóru vit betur við hesaferð. Tá lógu vit bara heilt afturí og vardu, meðan vit høvdu eitt sindur av spæli hesaferð.

Hóast Kristina spældi aftanfyri eina nýggja miðverju, føldi hon sjálv ikki nakran mun.

Men hvør var so orsøkin til, at so nógv mál fóoru ígjøgnum?

– Vit royndu at spæla, mistu bóltin uppi á miðjuni, allar fóru fram við, men komu ikki aftur við. Vit skuldu havt ligið longur afturí á vøllinum og ansa betri eftir, tá vit fóru fram á vøllin.

Vóru tit ikki í nóg góðari venjingarstøðu?

– Tað vístu vit so ikki, at vit eru. Men man skuldi trúð, at vit vóru í form, tí vit hava vant nógv, bæði í feløgunum og við landsliðnum, og hava spælt nógvar dystir.

Ert tú skuffað eftir dystin í dag?

– Eg eri stak skuffað.

Hvussu verður so næstu ferð?

– Tað verður nógv betri. Vit reisa okkum aftur móti Skotlandi. Vit mugu gloyma alt um hendan dystin, og so fyrireika okkum væl til dystin næsta leygardag, segði Kristina Lervig eftir dystin.

ek

BRYNHILD VAR VÓNBROTIN AV AT VERÐA SKIFT ÚT

Tað gekk væl hjá mær, og skilti ikki rættiliga hví eg skuldi verða tikin út, sigur Brynhild Klein

Tað mundi koma óvart á onnur enn fjølmiðlafólkini, at Brynhild Klein var tikin av vøllinum, tá hálvur tími restaði av dystinum.

Hon hevði uttan iva verið tann føroyski spælarin, sum hevði staðið fyri tí besta avrikinum fram eftir vøllinum, og fekk í seinna hálvleiki rættiliga gongd á framrættaða spæli við góðum driblingum fram við belgisku spælarunum. Tað lá líkasum í luftini, at hon fór at leggja upp til eitt mál, ella kanska bróta ígjøgnum sjálv.

– Eg helt sjálv at tað gekk væl hjá mær. Eg fekk rættiliga gongd á í seinna hálvleiki, og eg skilti ikki hví eg skuldi vera tikin út, segði Brynhild Klein eftir dystin

– Tað var annars skuffandi, at tað skuldi ganga so illa hjá okkum. Eg hevði ikki væntað, at vit fóru at tapa so nógv.

Brynhild Klein hevur spælt sera væl fyri B36 í steypakappingini í ár, og tað var eisini hon sum tryggjadi høvuðsstaðarliðnum viðari luttøku, tá hon javnaði í yvirtíðini í dystinum móti ÍLF í Lorvik fyri góðari viku síðani.

Tað síst eisini í dystinum móti Belgia at Brynhild er væl fyri, og spennandi verður tað, tá hon skal royna seg móti Skotlandi og Wales, har spælararnir ikki eru so skjótir, sum teir hjá Belgia vóru tað.

– Nú mugu vit gloyma alt um hendan dystin, og siggja fam til næsta dyst og leggja alla orku í at fáa eitt nógv betri úrslit enn hesaferð,

– Tað er ringt at siga hvat gekk galið hesaferð, men tað vóru fleiri ting. sum spældu inn.Vit mugu bara gera tað betri sum heild næstu ferð.

ek



Brynhild Klein stóð fyri besta føroyska avrikinum fram eftir vøllinum, men hon var óskiljandi skift út tíbliga í seinna hálvleiki. Mynd: Áki Hermansen

9 FERÐIR FRAM VIÐ UNN JARNSKOR

Debutanturin í føroyska málinum noyddist 9 ferðir í málið eftir bóltinum

Í fjør var Christina Holm fyrstavalið í føroyska málinum, og Unn Jarnskor (systur landsliðsspælarnar Henning og Magna) var eykamálverji.

Nú tá Christina ikki longur var tøk á landsliðnum var tað upplagt, at Unn fekk kjansin.

– Tað var ómetaliga stuttligt at sleppa at vera á vøllinum frá byrjan og stilla upp til tjóðsangin og alt tað. Men tað var ikki líka spennandi at fara 9 ferðir í málið eftir bóltinum, segði Unn Jarnskor eftir dystin.

– Eg fekk lítið gjørt fyri at forða teimum í at skora, tí sum oftast vóru tær fullkomiliga leysar beint frammanfyri málið.

– Eg dugi ikki at siggja, at eg skal hava spælt meg av liðnum, men tað verður upp til venjaran at avgera. Tað er altíð tann, sum er best fyri, sum sleppur at spæla, segði Unn Jarnskor.

ALLAR VÓRÐU AFTURVALDAR

Páll Guðlaugsson hevur sent boð eftir júst teimum somu 18 spælarunum, sum vóru við í høpinum móti Belgia. Tveir vóru ikki við til dystin, tí í mesta lagi 16 kunnu vera við til dystin.

Væntandi er, at onkrar broytingar verða gjørdar á liðnum, sum skal spæla móti Skotlandi leygardagin, men eingin orsøk er til at leypa fram av, og gera tingini óneyðuga innviklaðb, tí spælararnir í høpinum er teir bestu í Føroyum, og spurningurin er bara at blanda kortini rætt og fáa kvinnurnar at striðast meira.

Dysturin verður spældur leygardagin kl. 13.00.

HAGTØL

EM-undankappingardystur á Svangaskarði 18.05.96
Føroyar-Belgia 0-9 (0-2)

25.: 0-1 Myriam Vanslembrouck
43.: 0-2 Wendy Migom
61.: 0-3 Myriam Vanslembrouck
67.: 0-4 Christine Saelens
69.: 0-5 Myriam Vanslembrouck
76.: 0-6 Femke Maes
79.: 0-7 Christine Saelens
87.: 0-8 Myriam Vanslembrouck
90.: 0-9 Carine Maus

Føroyar: Unn Jarnskor, GÍ – Sólva Joensen, B36, Margit Joensen, KÍ (79.: Sólgerð Viderø, B36), Kristina Lervig, LÍF, Birita Ellefsen, HB, Ingun Hansen, Skála – Gunnid Hansen, Vejgård BK, Helga Ellingsgaard, Rødovre BK, Brynhild Klein, B36 (64.: Borglis Fagradal, Skála), Eyðvør úr Dímun, HB – Judith Joensen, B36 (60: Sonja Hansen, LÍF)

Ábrar í høpinum: Maibritt Eystberg, B36, Bára Skaale, KÍ

Venjari: Páll Guðlaugsson

Hjálparvenjari: Alvur Hansen

Liðleiðari: Jákup Simonsen

Lækni: Jákup Midjord

Belgia: Isabella Deflem – France Cotteaux, Dorine Delombaerde (85.: Christine Nelis), Fabianne Henraat, Ann Eeckhoudt – Sonia Deschepper (68.: Femke Maes), Wendy Migom, Myriam Vanslembrouck, Carine Maus – Cecile Camol (68.: Nadia Puttemans), Christine Saelens

Ábrar í høpinum: Katty Camphyn, Elke Dhollander

Venjari: J Bol

Gul kort: Eingi


Dómari: Vibeke Gabrielsen, Noreg

Linjuverjar: Vibeke Larsen, Noreg, Lisbeth Hoch Lode, Noreg

4. dómari: Lassin Isaksen, Føroyar

UEFA-umboð: Kaj Bernhard Rasmussen, Danmark

Íkomandi dystir: 26.05.96: Føroyar-Skotland
02.06.96: Skotland-Wales
05.06.96: Føroyar-Wales



FLEIRI NÝGGJAR SPÆLDU

Tveir debutantar byrjaðu móti Belgia og ein afturat kom við í seinna hálvleiki

Tað hevur leingi verið greitt, at nýggir spælarar fóru at vera við á kvinnulandsliðnum, sum skuldi spæla landsdyst móti Belgia, og soleiðis var eisini tá dagurin nú upprann.

Tveir debutantar vóru á liðnum frá byrjan og í seinna hálvleiki kom enn ein nýggjur spælari á vøllin.

Unn Jarnskor byrjaði í málinum, har Christina Holm annars hevur spelt í øllum hinum dystunum. Christina er ikki við í høpinum longur, og hesaferð valdi Páll Guðlaugsson, venjari, at seta málverjan hjá Skála í mál. Eykamálverji var Maibritt Eystberg, sum eisini er nýggj á liðnum.

Á einum miðvallarplássi í vinstru síðu byrjaði HB-arin Eyðvør úr Dímun. Hon var ikki við í høpinum í fjør, og byrjaði á vøllinum, fyrstu ferð hon var komin við í 16-mans stóra høpin. Á bonkinum vóru tríggir spælarar, sum ongan altjóða skrásettan landsdyst áður hava spælt, og ein teirra kom á vøllin. Seinstu minuttirnar avloysti Sólgerð Viderø hjá B36 Margit Joensen hjá KÍ á øðrum stopparaplássinum.

Málverjin Maibritt Eystberg og Bára Skaale komu ikki inn.

Úr høpinum, sum taldi 18 kvinnur undan dystinum, fóru Eyðfrið Christiansen hjá EB og Liljan Jespersen hjá HB, sum báðar eru nýggjar í høpinum.

ek

SKRÆDL Á SVANGASKARÐI

Føroyska liðið hevði stórar trupulleikar í vinstru verjusíðu, men einki var gjørt fyri at rætta um hetta. Í seinna hálvleiki runnu belgisku kvinnurnar ferð eftir ferð ígjøgnum og fingu fulla úrtøku burtur úr teimum málkjansunum sum vóru

Føroyska kvinnulandsliðið fekk leygardagin vánligasta úrslit, sum nakað lið hevur fingið í altjóða fótbólti á Svangaskarði. Tær vóru illa upplagdar móti einum sterkum og effektivum belgiskum liði, sum í seinna hálvleiki gjørdi bart.

Dysturin byrjaði ikki so illa fyri føroyska liðið, sum fyrsta partin av dystinum var væl við, stríddist fyri sakini, og inn imillum hevði góðar bóltflytingar á egnari hálvu. Ongantíð komu tær tó til kjanst, og oftast endaðu álopini, tá avgerandi avleveringin skuldi falla. Antin vóru tær í rangstøðu ella fingu belgisku kvinnurnar fatur á, áðrenn tað gjørdist vandamikið.

Í verjupartinum sæst beinavegin, at trupulleikar vóru í vinstru síðu. Ingun Hansen varð flutt aftur á verjuplássið, har Birita Ellefsen annars hevur spælt, men henda skiftingin riggaði ikki. Ingun hevur opinlýsar kvalitetir í álopsspælinum, men tað knípti hjá henni at fáa bilbugt við verjuskyldurnar.

Belgisku kvinnurnar spældu sær ferð eftir ferð ígjøgnum í okkara vinstru síðu, meðan hinumegin, har Sólva Joensen spældi, vóru eingir trupulleikar í verjupartinum.

Allan dystin var væntandi at broytingar fóru at koma á liðið, so verjan gjørdist ein betri ein, men tá útskiftingar komu í seinna hálvleiki, var besti føroyski spælari, Brynhild Klein, tikin av vøllinum. Sjálvandi skuldi Borglis Fagradal inn at royna seg, men hon kundi ikki spælt nógva aðrastaðni, tí hon er eitt tann besti allround spælarin í føroyska høpinum.

Belgia kom annars á odda, tá 25 minuttir vóru spældir av dystinum. Wendy Migom spældi stutt horna til Myriam Vanslembrouck, sum smekkaði til. Bóltarin fór høgt oman yvir føroyska spælarunum og í mál.

Seks minuttir fyri hálvleik fekk hon rættiliga gongd í driblingarnar, og tað lá líkasum í luftini, at hon kundi skapa onkran málkjans. met tíðliga í seinna hálvleiki var hon skift út, og Borglis Fagradal kom á vøllin. Borglis hevði drigist við skaða, og mett var ikki ráðligt, at hon byrjaði dystin, Hon kom á vøllin og vísti talt fyri eitt, at hennara dygdir kunnu brúkst í dystinum móti Skotlandi næstu ferð.

Ferð eftir ferð spældu belgisku spælararnir seg ígjøgnum føroyska verjuna, og tær vóru óhugnaliga effektivar. Belgia hevði í seinna hálvleiki 8 royndir uppá mál, og 7 ferðir sat bóltarin í kassanum.

Tað var lítið sum føroyski málverjin, Unn Jarnskor, fekk gjørt fyri at verja fyri, tí sum oftast vóru belgisku kvinnurnar púra blankar mitt fyri.

Fram eftir vøllinum var Brynhild Klein besti føroyski spælarin. Í seinna hálvleiki

BALLEX®
fótboltar, handboltar, flogboltar og kurvaboltar
REAL málmanshandskar
Annars alla ítróttarutgerð til allar ítróttargreinir...
All-Inter heilsalan

DYSTURIN Í TØLUM

(Fyrri hálvleikur/seinni hálvleikur)

	FØROYAR	BELGIA
Málspørk	9/4	2/2
Hornaspørk	0/0	4/0
Fríspørk	1/5	2/3
Brotsspørk	0/0	0/0
Rangstaddar	5/0	1/1
Royndir upp á mál	1/1	7/8
Mál	0/0	2/7
Gul kort	0/0	0/0
Reyð kort	0/0	0/0